Álit

í

løgtingsmáli nr. 64/2020 Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um Húsalánsgrunn (Víðkan av stýri, heimild at útvega lutaíbúðir, heimild at veita ráðgeving um alternativar byggihættir, økt lánsheimild til bústaðabygging, heimild at stovna partafelag o.a.)

Landsstýrismaðurin í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, hevur lagt málið fram 8. desember 2020, og eftir 1. viðgerð 20. januar 2021 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 21., 25. og 28. januar, 9. og 16. februar og 9. og 16. mars 2021.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við umboð fyri Landsbankan, MEGD saman við Sinnisbata og Javna, áhugafelagið Búgva, Betri Pensjón, P/F Lív, Felagið Føroyskir Peningastovnar, Mark, P/F Toftanes, Kvinnuhúsið, Vinnuhúsið, MTV Byggivirki, Articon, Barnaverndarstovuna, Bústaðir, borgarstjórarnar í Runavíkar, Nes, Sjóvar, Tórshavnar og Klaksvíkar kommunu, umboð fyri Tórshavnar Kommunu, landsstýrismannin í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen, landsstýrismannin í heilsumálum, Kaj Leo Holm Johannesen, saman við Gigni og við landsstýrismannin í almannamálum, Elsebeth Mercedis Gunnleygsdóttur, saman við Almannaverkinum.

Undir viðgerðini hevur nevndin býtt seg í ein meiriluta og ein minniluta.

Meirilutin (Uni Rasmussen, Rósa Samuelsen, Annika Olsen og Erhard Joensen) hevur hesar viðmerkingarnar:

Seinastu árini hevur stórur fólkavøkstur verið í Føroyum, sum hevur viðført eitt økt bústaðartrot. Yvirskipaða endamálið við lógaruppskotinum um lániheimild til Húsalánsgrunnin er tí at stimbra bústaðabygging í Føroyum og harvið útvega fleiri bústaðir.
Neyðugt er, at vit hava ein fjøltáttaðan bústaðarmarknað, ið nøktar ymiskar bústaðartørvir hjá okkara borgarum t.e leigubústaðir til eldri, til lesandi, til fólk við serligum avbjóðingum, til sosialt útsettar borgarar og bústaðir til fíggjarliga hart sperdar barnafamiljur v.fl.

Broytt bústaðar- og familjumynstur
Bústaðarmynstrið í Føroyum er í støðugari broyting. Frá at næstan hvør familja vildi eiga síni egnu sethús, er støðan ein onnur í dag. Nú er tað ikki óvanligt, at t.d. ung, ið eru liðug við lesnað og eldri borgarar ynskja ein minni bústað. Eisini eru fólk, har fíggjarlig og sosial viðurskifti gera, at einasti møguleiki fyri bústaði er ein leigubústaður.
Orsakirnar kunnu vera ymiskar. Hjá ungum nýútbúnum kann tað vera trupult at útvega neyðugu eginfíggingina av útveganarvirðinum fyri eini hús ella eigaraíbúð. Hjá eldri borgarum kunnu umstøður gera, at tey ikki síggja seg før fyri at viðlíkahalda eini eldri sethús.
Familjumynstrið er eisini broytt rættiliga nógv síðstu áratíggjuni. Alsamt fleiri liva sum støk, eisini støk við børnum, og hesi hava, í størri mun enn hjún, trupult við at útvega fígging til keyp av egnum bústaði.
Tí er neyðugt við einum fjøltáttaðum leiguíbúðarmarknaði kring alt landið, eins og tað hevur víst seg í okkara grannalondum.

Býta landið upp í øki og javnseting
Meirilutin metir tað vera rættari, at Bústaðir samstarva við onnur í øllum pørtum í landinum heldur enn at býta landið upp í øki alt eftir, hvar kapping er og ikki.
Ein uppgerð gjørd av Kommunufelagnum í 2018 vísir, at umleið 1400 sethús standa tóm kring landið. Hetta stuðlar undir, at tað er grundarlag fyri kapping kring alt landið. Tó sigur uppgerðin onki um, hví húsini standa tóm, og í hvussu stóran mun hesi eru atkomulig til langtíðarleigu.
Meirilutin heitir á landsstýrið um at broyta kunngerðina um sølu av almennari ogn, soleiðis at tað privata og almenna verða javnsett, tá talan er um at byggja almannagagnligar bústaðir. Undantak í regluni fyri almennari sølu eigur at kunna verða gjørt, tá talan er um bygging av almannagagnligum íbúðarverkætlanunum.

Lutaíbúðir
Lutaíbúðir er eitt nýtt hugtak í føroyskari íbúðarbygging, og meirilutin fegnast um hendan nýggja og øðrvísi fíggingarmøguleika. Lutaíbúðir er í høvuðsheitum ein fíggingarháttur, sum hevur verið brúktur í okkara grannalondum í nógv ár og tað eru ábendingar um, at eisini føroyingar sýna hesum áhuga. Húsalánsgrunnurin er farin í gongd við fyrstu lutaíbúðarverkætlanirnar á Toftum og í Vági. Í Tórshavn eru eisini nakrar lutaíbúðir, og áhugin sær út til at vera stórur. Mest sannlíkt verður hetta ein partur av føroyska íbúðarmarknaðinum í framtíðini. Heimildin hjá Húsalánsgrunninum at stovna lutaíbúðarfeløg hevur ikki verið greið, og tí verður hendan heimildin staðfest í lógaruppskotinum.

Bygging til serligar málbólkar
Umframt øll tey sum standa á bíðilistum í dag, er tað ein serligur málbólkur av okkara borgarum, sum hava tað sera trupult við at fáa tak yvir høvdið, og sum eru dottin heilt niður ímillum. Tí er neyðugt eisini at hava sokallað sosialt bústaðarbyggjarí, sum eigur at verða tilskilað einum greitt avmarkaðum málbólki, sum fevnir um persónar, sum eru sosialt illa fyri. Teir fysisku karmarnir skulu seta førleikar hjá tí einstaka og virðing í miðdepilin. Talan er um vaksin fólk, kvinnur og menn og einsamallar uppihaldarar. Tað er ikki greitt tilskilað í lóggávu, hvør myndugleiki hevur ábyrgd av hesum málbólki, um tað er landið ella kommunurnar, tí kann tað gerast við heimild til eitt samstarv millum myndugleikarnar.
Upplýst varð fyri nevndini av m.a. Tórshavnar Kommunu, at bráfeingis tørvurin til sosialar íbúðir er mettur til einar 50 íbúðir. Tað kann vera skilagott at byggja eindir, har eini 6 - 8 fólk/familjur búgva saman í eindum.
Tí er neyðugt, at Bústaðir hava ein bíðilista, sum vísir á, hvørji hava átrokandi tørv á at fáa eina íbúð, og at hetta slag av bústøðum greitt verður tilskilað í nýggja bústaðarpolitikkinum.

Lógaruppskotið leggur upp til, at 200 mió. kr. skulu brúkast til serstakar verkætlanir, herundir lestraríbúðir og til borgarar við serligum tørvi, herundir barnabústaðir, tað sum í dag eitur Barnaheimið.

Vit kunnu nú fegnast um, at gongd kemur á bygging til fólk við serligum tørvi, t.v.s. fólk, sum standa á bíðilista hjá Almannaverkinum, sum hava menningartarn, sálarligar avbjóðingar, líða av seinárinum av bráð- ella varðandi sjúkum ella eru sosialt illa fyri. Tá fleiri íbúðir/búfelagsskapir verða lidnar, kunnu fólk, sum í dag búgva inni í sambýlum, men kunnu klára seg í egnari íbúð, fáa eina íbúð.
Hetta frígevur pláss í teimum ymsu sambýlunum, og tey sum hava tørv á hesum sleppa lættari framat.
Fíggjarliga fyri landið og fyri tann einstaka persónin er tað ikki í lagi, at landið ikki hevur bústaðir til

fólk, sum klára seg í egnari íbúð, men eru noydd at búgva í sambýlum, har teirra frælsi og privatlív verður avmarkað. Tey verða fastlæst í tí tilboðnum, sum tey eru noydd at verða í.

Almannaverkið hevur upplýst, at komandi 10 árini, verður brúk fyri 248 íbúðareindum til borgarar, sum Almannaverkið varðar av. Almannaverkið upplýsti eisini fyri Trivnaðarnevndini, at bygging av íbúðareindum, heldur enn sambýlum, var tað skilabesta at gera, bæði fyri brúkaran, men sanniliga eisini fyri tað almenna, sum ber kostnaðin av rakstrinum av økinum. Tað eru rættiliga nógvir borgarar, sum í dag búgva í sambýlum, sum høvdu klárað at búð í einum búfelagsskapi. Rakstrarkostnaðurin fyri tað almenna er 3-5 ferðir minni fyri ein búfelagsskap enn eitt sambýli.
Eisini er tørvurin á lestraríbúðum til staðar ymsastaðni í landinum. Hetta uppskotið fer at loysa ein bráðfeingis og stóran tørv.

Víðka stýrið úr 3 upp í 5 limir
Uppskotið leggur upp til, at stýrið fyri Húsalánsgrunnin verður víðkað frá 3 limum til 5 limir. Grundin til broytingina er at styrkja stýrið, soleiðis at Húsalánsgrunnurin fær enn betri møguleikar at virka og mennast til tær avbjóðingar, ið hetta uppskotið leggur upp til. Meirilutin tekur tí undir við hesum.

Endurskoða bústaðarpolitikk landsins
Bústaðarpolitikkur landsins er orðaður í 2012, og hevur staðið óbroyttur síðan. Sambært Húsalánsgrunninum hevur bústaðarpolitikkurin verið eitt gott amboð, sum tey hava hildið seg til í teirra bústaðarbygging. Nú skjótt 10 ár eru liðin, síðani vit fingu bústaðarpolitikk landsins, er tíðin komin til at endurskoða bústaðarpolitikkin, og eigur hetta at verða gjørt skjótast gjørligt. Politiska skipanin, saman við Almannamálaráðnum og Húsalánsgrunninum, eigur at standa fyri hesum arbeiði. Tað er umráðandi, at politiska skipanin og Húsalánsgrunnurin hava somu fatan av, hvussu vit á skilabestan hátt loysa avbjóðingina við bústaðartrupulleikanum í landinum, við atliti at, hvat slag av íbúðum og til hvørjar málbólkar, Húsalánsgrunnurin skal byggja. Eisini eigur bústaðarpolitikkurin at leggja dent á at byggja orkuvinarligt. Øll komandi bygging, sum Húsalánsgrunnurin fremur, skal verða grundað á varandi orku.

Samstarv við aðrar íleggjarar og P/F formurin
Hvussu kann tann almenni og tann privati leigumarknaðurin samvirka, og hvussu kann eitt samstarv millum tann almenna og privata geiran tryggja, at bústaðaravbjóðingin verður loyst so skjótt sum til ber, og at Húsalánsgrunnurin tí í framtíðini arbeiðir eftir 2 rásum.

Fyrra rásin er tað, sum Bústaðir higartil hava gjørt. Vardar íbúðir, lestraríbúðir og leigubústaðir og lutaíbúðir kring landið eftir einum føstum frymli, hvat viðvíkur útrokning av húsaleigum, bíðilistum og samstørvum við kommunur, áhugafeløg og almennar myndugleikar.

Nýggja rásin verður til virksemi, har marknaðarstøðan ger tað natúrligt, at Bústaðir samstarva við aðrar íleggjarar. Húsaleigurnar kunnu verða roknaðar við einum hægri avkasti – til tess at fáa annan kapital at verða við, og talan kann millum annað verða um lutaíbúðir, har Bústaðir fáa vinning av at selja burtur av tí, sum bygt verður. Virksemið eftir nýggju rásini verður lagt í eitt partafelag fyri seg hjá Bústøðum, har eisini annað samstarv við øðrum aktørum verður staðsett, sum t.d. umsitingar- og rakstraravtalur millum samstarvspartarnar.

Tað er einki løgið í hesum, og í fleiri av okkara grannalondum eru mørkini millum alment, institutionelt og privat flótandi. Bústaðir hava í dag stórrakstrar fyrimunir, sum eisini kunnu verða gagnligir og nýtiligir hjá privatum og stovnsligum aktørum.

Raðfestingar
Meginøkini, har bústaðatørvurin er størstur, eru eisini, har marknaðarstøðan ger tað møguligt hjá øðrum íleggjarum at fáa ein nøktandi vinning og ein minni váða.
Bústaðir skulu luttaka við bæði leigu- og lutaíbúðum í meginøkinum. Í so stóran mun sum gjørligt, saman við øðrum áhugamálum til tess at fáa eitt so stórt útboð sum gjørligt. Bústaðir skulu eisini, sum tað bústaðapolitiska amboðið, raðfesta, at byggjast skal um alt landið og at byggjast skal til serligar bólkar – raðfest í samráð við politiska myndugleikan.
Hetta merkir, at Bústaðir á flest øllum plássum skulu arbeiða fyri, at eitt ávíst útboð er av alternativum bústaðarmøguleikum. Eisini skulu eldravinarligir bústaðir, vardir bústaðir, lestrarbústaðir og barnabústaðir raðfestast í einum samstarvi við lands- og kommunalar myndugleikar.

Sum nakað nýtt verður eisini heitt á Bústaðir um at fáa til vegar eitt tal av "sosialum bústøðum", sum umframt tær íbúðirnar, sum felagið tillutar gjøgnum Almannaverkið, skulu eyðmerkjast til fólk, sum hava ein bráðfeingis tørv. Teir "sosialu bústaðirnir" skulu raðfestast, umsitast og tillutast í samstarvi við kommunalu myndugleikarnar.

Yvirskipað
Tað er ikki eitt eindømi fyri Føroyar, at vit hava bústaðapolitiskar avbjóðingar.
Í londunum kring okkum er eisini eitt rák, har alsamt fleiri hava tørv á, at stig verða tikin til eitt størri, bíligari og meira fjølbroytt bústaðarútboð. Serliga eru avbjóðingar í teimum størru býunum, har vanligir lønmóttakarar ikki hava ráð at búseta seg. Sjálvt ES hevur arbeitt við loysnum uppá, hvussu bústaðurin kann raðfestast, so sosial neyð og menniskjaligar vanlagnur ikki vinda upp á seg – hetta undir heitinum "Housing First".

Meirilutin hevur soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Frágreiðandi heitið verður orðað soleiðis:
   "(Víðkan av stýri, heimild at útvega lutaíbúðir, økt lánsheimild til bústaðabygging, heimild at stovna partafelag o.a.)"

2. § 1, nr. 4 verður strikað.
   § 1, nr. 5-6 verða hereftir § 1, nr. 4-5.

3. Í § 1, nr. 5, (sum verður § 1, nr. 4) verður § 8 c, stk. 2 – 4 orðað soleiðis:

   "*Stk. 2.* Av 450 mió. kr. skulu 250 mió. kr. fíggja bústaðabygging kring landið saman við øðrum íleggjarum, sbr. tó stk. 4. Harafturat skulu 200 mió. kr. fíggja bústaðaverkætlanir til serligar málbólkar. Landsstýrismaðurin og Húsalánsgrunnurin gera avtalu um staðseting og málbólk til íbúðarverkætlanir til serligar málbólkar.
   Stk. 3. Tá Húsalánsgrunnurin saman við íleggjarum fer undir verkætlanir á vanliga bústaðamarknaðinum, skal grunnurin virka undir somu treytum sum teir partar, ið luttaka í verkætlanini saman við Húsalánsgrunninum.

Stk. 4. Hóast ásetingina í stk. 2, 1. pkt., kann landsstýrismaðurin loyva Húsalánsgrunninum at fara undir verkætlanir einsamallur, um ongin áhugi er hjá íleggjarum at verða við í verkætlanini ella trupult er at fáa semju við íleggjarar."

4. Í § 1, nr. 6 (sum verður § 1, nr. 5) verður § 8 d, stk. 1 orðað soleiðis:
"Húsalánsgrunnurin kann stovna partafeløg til virksemi fevnt av § 8 c, stk. 1 og 2, treytað av at verkætlanin hevur ein ella fleiri íleggjarar."

5. § 2, stk. 1 verður orðað soleiðis:
"*Stk. 1.* Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd."

Serligar viðmerkingar:

Til nr. 1:
Frágreiðandi heitið verður broytt, tí at heimildin at veita ráðgeving um alternativar byggihættir, verður tikið úr uppskotinum.

Til nr. 2:
§ 1, nr. 4 verður tikið burtur úr uppskotinum.

Til nr. 3:
Stk. 2 verður broytt soleiðis, at av teimum 450 mió. kr. skulu 250 mió. kr. fíggja bústaðabygging kring landið. Landið verður sæð sum ein heild og ikki býtt upp í øki, har treytirnar eru ymiskar um grundarlag er fyri kapping ella ikki.
Harafturat verður sett sum treyt, at hesar verkætlanir skulu vera saman við øðrum íleggjarum. Tó er eitt undantak sett í stk. 4.
Eisini skulu 200 mió. kr. fíggja íbúðarverkætlanir til serligar málbólkar. Her skulu landstýrismaðurin og Húsalánsgrunnurin gera avtalu um staðseting og málbólk av íbúðarverkætlanunum.

Í stk. 3 verður "í teimum økjum í landinum, har grundarlag er fyri kapping" strikað.

Stk. 4 verður umorðað soleiðis, at Húsalánsgrunnurin kann fáa loyvi til at fara undir verkætlanir uttan aðrar íleggjarar.
Landsstýrismaðurin metir um, nær undantak kann gevast. Talan skal verða um, at samráðingar við privatar ella stovnsligar íleggjarar ikki bera á mál, ella at mett verður, at eingin veruligur áhugi er at vera við í verkætlanini.

Til nr. 4:
§ 8 d, stk. 1 verður umorðað soleiðis, at Húsalánsgrunnurin fær beinleiðis heimild til at stovna partafeløg til virksemi fevnt av § 8 c stk. 1 og stk. 2, treytað av, at verkætlanin hevur ein ella fleiri íleggjarar.

Til nr. 5:
Teknisk broyting. "Stk. 1" eigur eisini at tilskilast, tá gildiskomuásetingin hevur fleiri stykki.

Við hesum broytingum tekur meirilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Minnilutin (Sirið Stenberg, Eyðgunn Samuelsen og Hervør Pálsdóttir) hevur hesar viðmerkingar:

Bústaðir er søgan um Húsalánsgrunnin, sum frá 1964 gjørdist amboðið til at tryggja vanligum verkafólki og løntakarum í Føroyum eitt egið heim og møguleikan at seta føtur undir egið borð. Áður vóru fólk givin upp fyri skutil til bankarnar og til bústaðarspekulantar, serliga í høvuðsstaðnum.

Síðani hava nógvar royndir verið gjørdar at gera av við Húsalánsgrunnin. Og tað var um at eydnast í 2010, tá minnilutasamgongan millum Sambandsflokkin og Javnaðarflokkin á sumri 2011 gjørdi semju við Tjóðveldi og Framsókn um at umskipa Húsalánsgrunnin til Bústaðir, ið nú kundi gerast eitt upp aftur sterkari amboð til bústaðarpolitikk í Føroyum. Bústaðir kundu nú byggja leiguíbúðir, lutaibúðir, lestrar- og lærlingaíbúðir saman við kommunum og øðrum samstarvspørtum. Og Bústaðir kundu bjóða bankunum av við at bjóða fígging til vanlig fólk at byggja sær hús kring landið. Hendan seinasta heimildin er tó ikki fingin at virka.

Bústaðir fingu frá 2016 heimild at taka lán – og fingu gongd á íbúðarbyggingina kring landið, eisini har partur av íbúðunum varð markaður til fólk við serligum tørvi. Eitt uppskot um at útvega Bústøðum størri lánsheimildir varð lagt fyri tingið í 2019, men fall burtur áðrenn løgtingsvalið.

Síðani er onki hent – uttan drál og politiskar samráðingar við privatar byggiharrar.

Og nú varð so ein sonevndur "bústaðarpakki" lagdur fyri tingið. Bústaðir skulu fáa heimild at taka lán, men landsstýrismaðurin og privat áhugamál skulu gjøgnum politiskar avgerðir hava heimild at áseta vinning, gera partafeløg, siga hvar byggjast kann, gera prísin hægri fyri vanlig fólk og annað, sum skal tryggja vinning til privatar spekulantar.

Tíverri endurtekur søgan seg: Góðar skipanir, sum ættarlið hava bygt upp og stríðst fyri, til frama fyri fólkið í landinum, skulu nú ognartakast av teimum, ið hava verið mest ímóti – og skulu brúkast til at fremja privat, peningalig seráhugamál.

Hetta hevur onki við rættindini hjá fólkinum í landinum at gera. Hetta hevur onki við vinnuliga kapping at gera. Hetta er "privatkommunisma" og sum eisini kundi verið rópt "statskapitalisma".

Bústaðir skulu brúka sína lánsheimild at gera eitt ógjøgnumskygt net av samstørvum, sum sjálvsagt verður treytað av einum avgjaldskravi. Og hvør fer at hanga uppá váðan uttan at fáa vinningin? Ja, tað er sjálvandi tann vanligi føroyski skattgjaldarin, sum bústaðarpolitikkur átti at verið gjørdur fyri.

Sambært hesum uppskotinum kunnu Bústaðir ikki sláa ein seym í, uttan at tað privata skal hava vinning burturúr. Hetta skal eitt landsstýrisfólk sita og avgera. Og grundarlagið er púra tikið undan Bústøðum.

Tá ið vit frættu, at meirilutin í Trivnaðarnevndini hevði tikið avgerð um at taka burtur landafrøðiligu mørkini í lógaruppskotinum, og harvið eisini rættin hjá landsstýrismanninum at lýsa avkastkrav í kunngerð fingu vit góðar vónir um, at hetta fór føra við sær at leigan ikki hækkaði í miðstaðarøkinum, sum í løgtingslógini fer at merkja Tórshavn, Runavík og Klaksvík.

Men soleiðis er ikki. Nú leggja samgonguamboðini upp til at Bústaðir frameftir bert kunnu byggja saman við privatum og íleggjarum. Í hesum liggur sjálvsagt eitt fjalt avkastkrav, tí ongin privatur fer upp í nakra ætlan uttan vinning. Tí fer leigan at hækka allastaðni í landinum.

Samgongan tekur hervið alt grundarlagið undan Bústøðum, sum frameftir ikki kunnu virka á bústaðarmarknaðinum, sum vit kenna tað í dag. Bústaðir, sum søguliga hevur verið amboðið hjá landinum at tryggja vanligum fólki kring landið lán til egin sethús, og nú seinnu árini íbúðir kring landið.

Síðan lógarbroytingin um Bústaðir kom í 2011, hevur tað eydnast at fáa eina skipaða bústaðarbygging, har alt fleiri føroyingar trygt kundu fáa tak yvir høvdið uttan at óttast at verða blakað á dyr, ella at húsaleigan dýrkar uttan ávaring. Hetta verður nú brotið niður.

Hetta er als ikki bústaðarpolitikkur men reinur vinnupolitikkur
Her gevur man burtur almennar pengar til privat vinnurekandi í staðin fyri at tryggja vanliga føroyinginum tak yvir høvdið. Á henda hátt kunnu privat og íleggjarar, ið Bústaðir sambært lóg verður álagt at byggja saman við, áseta júst tey krøv, ið tey hava hug til, bæði tá ið tað kemur til kapitalavkast og annað. Hetta fer at hava við sær so høgar leiguprísir, at vanlig fólk ikki hava ráð at leiga, og síðan verður næsta stigið, at landið má koma inn við bústaðarstuðli, so tann privati verður tryggjaður sítt avkast.

Meginreglan verður frameftir, at Bústaðir verður bundið av at skula samstarva við privat og íleggjarar. Og ein undantaksregla er innsett til at brúka í heilt serligum førum, har víkjast kann frá hesi meginreglu, men til tess krevst loyvi frá landsstýrismanninum. Armslongdin millum politisku skipanina og Bústaðir er burtur og ístaðin verður grunnurin politiskt stýrdur út í æsir.
Hesum tekur minnilutin ikki undir við. Vit mæla hinvegin Løgtinginum til at samtykkja, at Bústaðir fær ta lániheimild, sum bíðað hevur verið eftir; 200 mió. kr. til búfelagsskapir og lestrarbýli og 250 mió. kr. til bústaðarbygging kring landið. Og at Bústaðir framhaldandi fara at virka sum í dag, ein sjálvstøðugur stovnur í tøttum samstarvi við politiska myndugleikan.

Hvar er Sambandsflokkurin og hvar er løgmaður
Sambandsflokkurin segði seg taka undir við bústaðarpakkanum hjá undanfarnu samgongu, har Bústaðir fekk eina lániheimild á 250 mió. kr. til at útvega bíligar bústaðir kring alt landið. Tá ið avtornaði umbar løgmaður seg við, at so tætt var uppundir val og at hetta uppskotið var so greitt, at tað kundi samtykkjast beinanvegin eftir valið.
Nú nærum 2 ár seinni, har øll nýggj íbúðarbygging hevur ligið still, kemur samgongan við einum uppskoti, ið snýr seg meira um vinnupolitikk enn bústaðarpolitikk og sum bindir almenna bústaðarfelagið niður og HESUM tekur Sambandsflokkurin undir við!

Bústaðarneyðin hevur ongantíð verið størri
Tað er ongin ivi um, at bústaðarneyðin telist millum okkara allarstørstu samfelagsavbjóðingar. Um ikki tann største. Og fyri tey, sum eru í bústaðarneyð er støðan sera álvarsom. Í nevndarviðgerðini er upplýst, hvussu trupul støðan hjá mongum av okkara medborgarum er. Eisini er upplýst, at bráðfeingis tørvur er á sosialum íbúðum. Bústaðarneyðin førir til fátækt, strongd og stúran, rótloysi, heimloysi, mistrivnað og í fleiri førum aðra sosiala neyð. Serliga er støðan trupul hjá børnum og barnafamiljum, sum kanska skulu flyta ofta, búgva inni hjá fólki o.a. sum ikki eru nøktandi tryggar umstøður at vaksa upp í.

Nú hava vit bíðað eftir einum bústaðarpolitiskum útspæli frá samgonguni í út ímóti 2 árum, meðan tey, ið ongan bústað hava, bara eru blivin fleiri, og støðan bara er versnað, tí ongir nýggir leigubústaðir hava verið bygdir, meðan bíðað hevur verið eftir, at samgongan fór at seta út í kortið. Fyri okkum sæst raðfestingin týðuliga. Samgongan hevur valt vinnuna framum fólkini, sum eru rakt av bústaðarneyðini.

Vit taka undir við, at tað nú er greinað í lógini um lutaíbúðir. Tørvur er á at fáa ein fjølbroyttari bústaðarmarknað.

Byggið búfelagsskapir og latið landsstovnarnar vera á fíggjarlógini
Almenni bústaðarpolitikkurin hevur verið verksettur soleiðis øll árini, at tað var eitt uppgávubýti millum landið og Bústaðir. Bústaðir byggja búfelagsskapir og lestrarbýli, meðan landið byggir landsstovnar so sum Barnaheim og sambýlir til brúkarar við ymiskum avbjóðingum til dømis fólk við fjølbreki, seinheilaskaða ella autismu. Hesir landsstovnar hava verið fíggjaðir av løguætlanini á fíggjarlógini.
Minnilutin tekur undir við, at bústaðarpolitikkur landsins verður endurskoðaður og at greitt verður ásett, at útvegan av sosialum íbúðum verður ein partur av almenna bústaðarpolitikkinum.

Í hesum uppskotinum verður lagt upp til, at landsstovnar sum eitt nú Barnaheimið kunnu byggjast og fíggjast av almenna bústaðarfelagnum. Hesum tekur minnilutin ikki undir við.

Orsakirnar eru fleiri: puljan á 200 mió. kr. til alment gagnligt byggjarí verður ov smábýtt og prinsipielt er tað skeivt og at fjala almennar útreiðslur við at leggja tær uttanfyri fíggjarlógina. Servitanin at byggja hesar stovnar er hjá landinum, og bíðilistin hjá Almannaverkinum minkar alt ov lítið, um peningurin verður brúktur á henda hátt.

Skulu hesar 200 mió. kr. brúkast skynsamt og samsvarandi tørvinum er rættast at byggja búfelagsskapir til fólk við serligum avbjóðingum, ið klára seg við eitt sindur av hjálp. Sum nú er, er einasta tilboðið til hesar borgarar eitt stovnspláss, ið er sera dýrt í rakstri og als ikki tað, sum borgarin ynskir.

Sambært ST-sáttamálanum hava fólk við serligum avbjóðingum rætt til at velja, hvar tey vilja búgva og saman við hvørjum.

Bíðilistin hjá Almannaverkinum er langur. Í dag eru umleið 150 borgarar, ið onki bútilboð hava, og ein stórur partur av hesum borgarum hava tørv á at fáa bústað í einum búfelagsskapi. Komandi fáu árini fer bíðilistin at vaksa, og er tørvur at byggja eini 8-10 búfelagsskapir kring landið.
Umframt at sparast kunnu nógvar tíggjutals milliónir í rakstri við at byggja búfelagsskapir, so er tað júst hesa bygging, ið ein stórur partur av teimum, ið eru á bíðilista hjá Almannaverkinum, ynskja og hava tørv á.
Tí skjóta vit upp, at ein bindandi avtala um at byggja búfelagsskapir samsvarandi tørvinum kring landið verður gjørd millum Almannaverkið og Bústaðir.

Bústaðar”pakki”
Fleiri bústaðarpolitisk uppskot hava verið løgd fram av andstøðuni síðan valið. Samgongan hevur grundgivið við, at tey ikki taka undir við hesum uppskotum, tí landsstýrismaðurin arbeiddi við einum bústaðarpakka. Men hesin sokallaði bústaðarpakkin er eingin pakki. Hetta er eitt lógaruppskot um eina lániheimild til Bústaðir, og við broytingunum frá samgongulimunum í

Trivnaðarnevndini, eitt uppskot, sum fer at avtaka Bústaðir sum alment bústaðarfelag. Hetta uppskotið er reinur vinnupolitikkur, ikki bústaðarpolitikkur.
Skuldi man tosað um ein bústaðarpakka so hevði hann eisini havt uppskot við átøkum fyri heimleys og uppskot um, hvussu man kann tryggja, at fólk fáa lán kring landið til at byggja egin hús. Somuleiðis átti pakkin at fevnt um uppskot, sum ásetur reglur um, hvør kann keypa upp ognir og jørð í Føroyum. Hesi uppskot eru løgd fram av pørtum av andstøðini. Ein veruligur bústaðarpakki kundi eisini rúmað viðgerð av bústaðarskyldu og øðrum.

Tal av nevndarlimun økjast
Fíggjarmálaráðharrin grundgav í KvF, at hann vildi minka um "pamparíið" hjá vinstravonginum og tí skuldi talið av nevndarlimum í almennum nevndum minkast. Hann vildi byrja við Búskaparráðnum og Landsbankanum. Tá ið tað kemur til Bústaðir, almenna bústaðarfelagið, vendir alt øvugt, nú krevur sami flokkur í samgonguni fleiri nevndarlimir. Vit kunnu spyrja okkum sjálvi, hví tað man vera.
Minnilutin tekur als ikki undir við at víðka nevndina fyri Bústaðir úr 3 til 5 limir. At víðka nevndina ger arbeiðið tyngri og ikki effektivari, sum annars verður lagt upp til, tá ið tað kemur til almennar nevndir. Nevndin fyri Bústaðir hevur víst seg at virka væl og heldur minnilutin, at 3 nevndarlimir er nøktandi til at fáa eina smidliga og skjóta arbeiðsgongd.

Minnilutin setur tískil fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. § 1, nr. 1 verður strikað.
   § 1, nr. 2-6 verða eftir hetta § 1, nr. 1-5.

2. Í § 1, nr. 5, (sum verður § 1, nr. 4) verður § 8 c, stk. 2 orðað soleiðis:

   "*Stk. 2.* Av 450 mió. kr. skulu 250 mió. kr. fíggja bústaðabygging kring landið. Harafturat skulu 200 mió. kr. fíggja bústaðaverkætlanir til serligar málbólkar. Landsstýrismaðurin og Húsalánsgrunnurin gera avtalu um, hvørjar bústaðaverkætlanir skulu gerast."

3. Í § 1, nr. 5, (sum verður § 1, nr. 4) verður § 8 c, stk. 3 og 4 strikað.

4. § 2, stk. 2 verður strikað.

Serligar viðmerkingar
Til nr. 1:
Stýrið verður ikki broytt. T.v.s. at har skulu bert verða 3 limir og ikki 5 limir.

Til nr. 2:
Stk. 2 verður broytt soleiðis, at av teimum 450 mió. kr. skulu 250 mió. kr. fíggja bústaðabygging kring landið. Landið verður sæð sum ein heild og ikki býtt upp í øki, har treytirnar eru ymiskar, um grundarlag er fyri kapping ella ikki.

Í staðin fyri, at landsstýrismaðurin skal góðkenna staðseting og málbólk fyri verkætlanir til serligar málbólkar, so verður hetta broytt til, at landsstýrismaðurin og Húslánsgrunnurin gera eina avtalu um, hvørjar bústaðaverkætlanir skulu gerast.

Til nr. 3:
§ 8 c, stk. 3 og 4 verður strikað.

Til nr. 4:
Ein fylgibroyting til nr. 1. Stýrið verður, sum tað er.

Við hesum broytingum tekur minnilutin undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 17. mars 2021

Uni Rasmussen
formaður

Sirið Stenberg
næstformaður

Eyðgunn Samuelsen

Hervør Pálsdóttir

Rósa Samuelsen

Annika Olsen

Erhard Joensen